**Skráin fyri temakvøldið er hendan:**

| | |
|---|---|
| 20.45: | En dansk overlevende |
| 21.00-22.30: | Til minde om Auschwitz |

**DR2 hóskvøldið 27. jan. kl. 19.45–22.30**

# *Temakvøld* – Til minnis um Auschwitz



*Víðagitni violinleikarin Maxim Vengerov framførir*

Nú hósdagin verða 60 ár eru liðin síðan fangarnir í týningarleguni Auschwitz-Birkenau vórðu latnir leysir. Hetta hendi, tá russiskar herdeildir náddu nasistisku týningarleguna í landsynningspartinum av Póllandi. DR2 sendir í hesum sambandinum eina dokumentarsending, ið BBC hevur framleitt. Sendingin er serlig, tí hon er ein konsert, ið er upptikin í og umkring leguna, har ræðuleikarnir í síni tíð vórðu framdir afturvið tónleiki, ið varð leiktur av einum fangaorkestri. Uppundir konsertsendingina prátar sjónvarpsverturin Martin Kranik við Moses Schwartz - ein dani, ið yvirlivdi Holocaust. Tá norðurtýska týningarlegan Bergen-Belsen var tikin vigaði Schwartz einans 36 kilo, men ganga skuldu næstan 40 ár, áðrenn hann orkaði at siga søguna um sína tíð í seks ymiskum týningarlegum í Póllandi og Týsklandi. Søga Moses Schwartz finst í bók hansara "Milde Moses - en overlevers erindringer", ið nýliga er komin út. Konsertsendingin inniheldur frásagnir um, hvussu tónleikurin bleiv brúktur afturvið ræðuleikunum og eisini, sum undirhald fyri SS-ovastunum. Í leguni vóru fleiri orkestur, ið vóru mannað av fangum, sum, við at spæla og syngja, sluppu undan at verða avrættaðir. Eva Adam varð úttikin til kvinnuligа orkestrið, ið sang tá tokini komu við nýggjum fangum. Sangirnir skuldu altíð verða lættir og glaðir sangir, hetta var fyri at teir nýggju fangarnir skuldu halda, at hetta staðið var kortini ikki so galið. Yvirlivandi siga frá søgu sínari um, hvussu tey vórðu noydd at framføra tónleik eftir boðum frá SS-hermonnunum. Eisini verða tónlistarlig innsløg, ið eru framførd í Auschwitz-leguni, við - hetta er fyrstu ferð í 60 ár at loyvi er givið til at framføra tónleik á staðnum. Heimskendi klaverleikarin Emanuel Ax og russiski violinleikarin Maxim Vengerov framføra m.a. verk eftir Chopin og Bach. Við í minniskonsert eru tónlistarfólk úr Póllandi, Bretlandi, USA, Kanada, Argentina, Russlandi og Kekkia.



*Fyri fyrstu ferð í 60 ár verður tónleikur aftur framførdu í Auschwitz*

# Breaking the Waves

**Kanal 5 sunnukvøldið kl. 22.25:**

Bess, ein ung og naiv genta úr eini lítlari skotskari bygd, fellur fyri Jan, ið er arbeiðsmaður á einum boripalli. Jan hevur sæð meiri av lívinum, er meiri royndur og vaksin. Hann er samstundis eisini meiri uppreistrarsinnaður. Men hann verður eisini forelskaður í Bess, og hóast fleiri týðandi eldri borgarar í bygdini mótmæla, so giftast Jan og Bess. Tey møta tó stutta lukku. Bess hevur tað ringt við at vera burtur frá Jan, tá hann fer út aftur á boripallin. Men vanlukkan hendir úti á boripallinum, og Jan fær heilaskaða og tað stendur um lív hjá honum. Á sjúkralegu sannførir Jan Bess um, at kærleiki teirra einans kann liva víðari um hon fær sær ein annan elskara og síðan sigur honum frá erotisku smálutunum. Við tungum iva fer Bess undir at gera tað, sum elskaði maður hennara ynskir, hóast at hetta kostar henni nógv.



*Søgan í filminum fer fram í einum lítlum og trongum bygdasamfelagi norðaligа í Skotlandi*



*Bess (Emily Watson) er ein ung og naiv genta*

**Danskur dramafilmur frá 1996**
**Leikstjórnað:** Lars von Trier
**Leikarar:** Bess: Emily Watson. Jan: Stellan Skarsgård. Dodo: Katrin Cartlidge. Terry: Jean-Marc Barr. Manden på trawleren: Udo Kier. Dr. Richardson: Adrian Rawlins. Præsten: Jonathan Hackett. Moderen: Sandra Voe